# Arbeiðsætlan fyri sunnudagsskúlan í Lívdini

Endamálið við arbeiðsætlanini er at lýsa, hvussu vit hava hugsað okkum at skipa sunnudagsskúlan í Lívdini og fremja endamálsorðingina, sum er lýst í øðrum skjali. Arbeiðsætlanin eigur at verða endurskoðað við jøvnum millumbilum.

## Ábyrgd av sunnudagsskúlanum í Lívdini

- Endaligu ábyrgdina av sunnudagsskúlanum hava elstarnir í Lívdini.
- Ein sunnudagsskúlanevnd er sett at hava dagligu ábyrgdina, og í henni eru: Súsanna Eliassen, Siri Davidsen, Sólvá Vang og Beinta Áargarð. Nevndin stendur undir Guttorm Joensen.
- Um eitthvørt stingur seg upp í sambandi við sunnudagsskúlan, ber altíð til at venda sær til sunnudagsskúlanevndina.
- Tá ið nýggj fólk koma uppí sunnudagsskúlan, fáa tey útflýggjað 'Leiðreglur fyri sunnudagsskúlalærarar', 'Leiðbeining: Kynslig misnýtsla av børnum og ómyndugum', 'Endamálsorðingin fyri sunnudagsskúlan í Lívdini' og 'Arbeiðsætlan fyri sunnudagsskúlan í Lívdini, - og tey skulu tey taka undir við tí, sum har stendur.
- Aftrat hesum fáa nýggj fólk útflýggjað skránna fyri komandi hálvár, yvirlit yvir sunnudagsskúlafólk og býti av liðum.
- Miðað verður ímóti at savna øll starvsfólkini í sunnudagsskúlanum tvær ferðir um árið (februar og september), - og tá verður altíð mint á 'Leiðreglur fyri sunnudagsskúlalærarar'.

## Flokkar

- Sunnudagsskúlin eru ætlaður børnum frá trý ára aldri og uppeftir. Tó kunnu foreldur meta um, nær barnið mentalt er ført fyri at fara í sunnudagsskúla. Vit eggja foreldrum til at koma við teimum smáu børnunum ta fyrstu tíðina og rokna hetta sum eina tilvenjingartíð.
- Sunnudagsskúlin er býttur í tveir flokkar (seinni møguliga fleiri flokkar):
  3 ára gomul upp til skúlaaldur - SMÍL
  1. flokkur til og við 4. flokk – GLEÐI
  (UngLív tekur sær av 5. flokki og uppeftir)
- Gentur og dreingir eru saman í øllum flokkunum.
- Um til ber eru tvey fólk til hvønn flokk.
- Sangarar skipa sína egnu skrá.
- Tónleikarar verða skipaðir saman við tónleikarunum til møtini.

## Stílur

- Ein sunnudagsskúlalærari stendur við dyrnar og bjóðar fólki vælkomnum longu 10 min., áðrenn sunnudagsskúlin byrjar, og verður standandi har, ímeðan sungið verður.

- Teir fyrstu 20 minuttirnar, tá øll eru saman, er felagssangur og bøn. Harumframt verður sungið fyri teimum, ið hava havt føðingardag farnu vikuna. Hvørja ferð syngja vit fleiri kór, men eisini ein sang við fleiri versum, soleiðis at børnini koma at kenna fleiri sangir. Sami sangur verður sungin fleiri vikur á rað, fyri at tey betur kunnu læra hann.

- Børnini, ið hava fylt, koma fram, ímeðan sungið verður fyri teimum, og tey sleppa at velja sær eina lítla gávu.

- Í øllum flokkunum skal dentur leggjast á at læra bíbliuvers uttanat. Sama vers verður nýtt í báðum flokkunum. Tey yngru kunnu læra ein part av tí, tey eldru skulu læra. Versið verður lært á ymiskan pedagogiskan hátt. Plansjur o.a. við versinum kunnu t.d. brúkast í flokkunum, soleiðis at innlæringin verður fjølbroytt.

- Í sjálvari undirvísingini skal høvuðsdenturin leggjast á bíbliusannleikar, men eisini á moral og etiskar meginreglur grundaðar á Bíbliuna.

- Frálæran verður gjørd viðkomandi fyri børnini. Sammetingar kunnu t.d. gerast við okkara tíð, soleiðis at børnini kunnu seta seg inn í støðuna ella evnið, ið lært verður um.

**Vegleiðandi fyri ein dag í sunnudagsskúlanum:**

| | |
|---|---|
| 20 min. | Felagssangur og bøn |
| 5 min. | Farið verður í flokkar |
| 20 min. | Undirvísing og læra vers |
| 15 min. | Kreativitetir og spøl |
| 60 min. | Tilsamans |

Tað er ikki neyðugt, at allir dagarnir í sunnudagsskúlanum eru heilt eins. Tað er tó óivað best, at fyrstu 20 minuttirnir vanliga fara til sang.

## Undirvísingartilfar

- Allir flokkar fáa undirvísing í sama evni samsvarandi eini ætlan, men tað er ikki neyðugt, at tilfarið og støðið er heilt eins.

- **Lesiætlan**: Vit hava avgjørt at nýta lesiætlanina hjá Evangelisk Børnemission, ið spennir yvir 4-5 ár. Tá eru vit komin ígjøgnum grundsannleikarnar og høvuðspersónarnar í Bíbliuni. Nógv av tilfarinum hjá Evangelisk Børnemission er uppbygt soleiðis, at tað tekur um 5-6 vikur at koma ígjøgnum evnið.

- **Læra børnini at geva**: Vit ynskja, at børnini frá ungum av læra at geva – t.d. trúboðarum og teimum, sum eru verri stødd.

## Børn í grannalagnum

Eitt av endamálunum við sunnudagsskúlanum er at røkka børnini í grannalagnum. Hetta kann gerast við serligum tiltøkum, sum børn í Hoyvík fáa innbjóðingar til.

Tiltøkini kunnu t.d. vera:

- Børnini spæla ein leik, tey hava vant
- Børnini framføra onkran sang, sum tey hava vant
- Dukkudreingirnir vitja.
- Onnur, sum gera nógv burtur úr barnaarbeiðnum, framføra okkurt.

Á øllum tilfari, sum børnini fáa heim við, kann hóskandi standa ein lítil lýsing um Lívdina (búmerki, heimasíðan og kanska okkurt annað).

Miðað verður ímóti, at øll húski í grannalagnum hjá skúlanum fáa eina innbjóðing, tá byrjað verður aftur eftir summarfrítíðina.

Sunnudagsskúlanevndin, 15. mai 2010

Siri Davidsen, Súsanna Eliassen, Sólvá Vang og Beinta Áargarð